Fríggjadag 20. kl. 19.00

Rollingar í París CANAL+
Rollingarnir eru í París, og so kann einki ferðamál kenna seg trygt. Hvørki Eiffeltornið ella Notra Dame kirkjan. Tey hava nevnliga funnið út av, at skemt merkir tað sama á øllum málum, og so kann restin vera tað sama.

Fríggjadag 20. kl. 19.00

Hit med sangen DR1
Sascha Dupont og Jens Krøyer eru liðskiparar, og saman við sær hava tey Stig Rossen, Lene Siel, Trine Gadeberg og Jesper Lundgaard í hesi serstøku jólaútgávuni av væl umtóktu undirhaldssendingini.

Fríggjadag 20. kl. 19.30

Junglubókin
Í hesi heldur øðrvísi útgávuni av væl kendu skaldsøguni hjá Rodyard Kipling eru vit í India í 19. øld. Klassiska søgan um Mowgli, sum verður uppaldur av djórunum í frumskóginum er framvegis hin sama, men hesaferð fer søgan eitt stig víðari, soleiðis at ógjørligur kærleiki eisini gerst ein partur av søguni.

Fríggjadag 20. kl. 20.25

Okkara kokkar SVF
Kokkarnir eru í jólahýri, teir fáa vitjan av nøkrum ungum jólagestum, sum sleppa at royna eitt sindur øðrvísi jólarættir. Sum forrætt fáa teir pannukøkukurv fylta við skeljamati, kalkunkjøti og grønmeti, síðani taka teir beinini úr lambsryggi og fylla við hummara og krydda, afturvið eru søtepli kryddað við nýhentaðum kryddurtum.

Leygardag 21. kl. 19.00

Grinchen CANAL+
Jólini eru stolin. Í hesum amerikanska skemtifilmi síggja vit millum annað tann altíð stuttliga Jim Carry, sum ferð eftir ferð snarar øllum á høvdið. Ikki minst, nú jólini skulu finnast.

Leygardag 21. kl. 20.00

SATSA SVF
Í 17. sendingini av Satsa verða tað Dora Samuelsen, Tórshavn, Mortan Mouritsen, Sørvágur og Rógvi Borðoy, Kollafjørður, sum fara at kappast um tær 2.000 krónurnar og møguleikan fyri stóra høvuðsvinninginum. Vertur er sum vant Páll Danielsen.

Leygardag 21. kl. 21.15

Blue Steel
Jamie Lee Curtis hevur leiklutin sum nýútbúna løgreglukvinnan Megan Turner, sum endar í eini sannari marru, tá hon í neyðverju skýtur og drepur ein ránsmann. Eingin veit at siga, hvar pistólurin hjá ránsmanninum er, og tí verður Megan tikin úr tænastuni í óásetta tíð.

Leygardag 21. kl. 22.05

Veiðimenninir SVF
Løgreglumaðurin Erik Bäckström flytur aftur til heimbygdina, har hann verður móttikin sum hetja. Tann virðiligi løgreglumaðurin fær skjótt snevilin av eini gølu, og tá hann fer undir at greiða málið, hvørvur øll vælvild. Eftir eitt álvarsligt brotsverk verður tað greitt, at løgreglumaðurin sjálvur stendur fyri skotum, heldur hann fram við kanningini.

Sunnudag 22. kl. 11.35

Petur og Drekin
Tann foreldraleysur Peter hevur tað ikki gott hjá óreinu stjúkfamilju síni, og tí ger hann av at rýma heimanífrá. Tá hittir hann fitta drekan, Elliott, sum dugir at gera seg ósjónligan, og saman við honum fær Peter eyguni upp fyri einum nýggjum og betri heimi.

Sunnudag 22. kl. 18.15



Paul Watson – verjin hjá hvalunum CANAL+
Paul Watson, sum man vera kendur av flestu føroyingum, greiður her frá hendingaríka lívi sínum og tí, sum hann skýrir sum ið stríð fyri umhvørvið. Eitt stríð ið sum kunnugt eisini hevur gjørt, at hann fleiri staðni verður skýrdur fyri at vera yvirgangsmaður.

Sunnudag 22. kl. 20.00

Jólareikan SVF
Í hesi seinnu Jólareikanini vitja vit á Ellisheiminum í Vágunum, har nógv verður gjørt burturúr, at gera tað so hugnaligt sum gjørligt fyri tey gomlu. Vit vitja eina familju í Vestmanna, har jólini eru eitt sindur øðrvísi. Og so verður eisini tosað um jólaplantur og jólabøkur.

Sunnudag 22. kl. 21.45

Meðan tú svav
Hóast Lucy hevur eina góða íbúð, kettu, familju og vinir, so er okkurt sum manglar. Hon hevur ikki nakran drong, og tí droymir hon oftani um høga myrkhærda mannin, sum dagliga keypir tokbilettir frá henni. Ein dagin dettur hesin, og onkursvegna kemur Lucy at greiða familjuni frá, at hon er genta hansara, men nústaðni byrja trupulleikar hennara av álvara.

Mánadag 23. kl. 18.00

Jólalund SVF
Angela tosar um marsipan og vísir kut frá tí ferðini, tá hon og 3 børn vitjaðu bakaríið og tey gjørdu marsipan. Arnfríð Lützen fer eisini at syngja ein jólasang. Angela og Olgar ynskja øllum gleðilig jól og Angela minnir á, hví vit halda jól.

Mánadag 23. kl. 18.00



Temakvøld: Walt Disney 100 ár DR2
Temakvøld um ein av mest gitnu kunstnarunum í heimssøguni. Nevnliga Walt Disney. Her verður nakað fyri bæði ung og gomul – ikki minst ein nýggjur dokumentarfilmur um lkívið hjá teknaranum.

Mánadag 23. kl. 19.55

Premier League: Man. City.-Tottenham CANAL+
Í mun til aðrastaðni, so eru jólini fótbóltshøgtíð í Bretlandi. Beinleiðis dysturin á Canal+ er tann millum Manchester City og Tottenham, sum bæði stríðast fyri at koma nærri europeisku sessunum.

Mánadag 23. kl. 21.50

Feita ferian hjá familjuni
Tá eitt húskið roynir at fáa nakrar góðar stundir saman, er ikki altíð, at alt gongst eftir vild. Serliga ikki um úrslitið er, at øll kroysta seg í ein bil og so bara dróna avstað eftir landavegnum.

Týsdag 24. kl. 19.30

Fínt skal tað vera BBC PRIME
Fínt skal tað vera - Ikki minst á jólum. Frú Bucket stríðist sum vera man fyri, at alt skal vera so fínt sum gjørligt á jólum, men tað er ikki heilt eftir hennara høvdi, tá Richard fær dekan ov nógv innanborðs av váta slagnum. Hann skal jú vera jólamaður.

Týsdag 24. kl. 20.00



Jólaynskið SVF
Will Martin er uppvaksin hjá ommuni og abbanum. Jólini hjá teimum hava altíð verið nakað heilt fyri seg, men í ár er alt broytt. Abbin er deyður, og omman hevur eittans jólaynski: at Will kannar hvat tað er, sum abbin hevur dult fyri teimum báðum í 25 ár.

Týsdag 24. kl. 21.00

Hannibal CANAL+
Hannibal er aftur – og hann er svangur. Men ríki sadisturin Verger vil hava fatur á honum. Clarice Starlings er sum vera man tann einasti, sum kann finna hann, men hon er eisini tann einasti, sum kann verja Hannibal móti Verger.

Týsdag 24. kl. 21.25

Jól við teimum trimum tenorunum SVF
Tenorarnir eru Luciano Pavarotti, Plácido Domingo og José Carreras. Teir hittast í konserthøllini í Wien við symfoniorkestrinum í Wien við Steven Mercurio á odda syngja teir allar teir kendu jólsangirnar. Teir fáa eisini stuðul frá Gumpoldskirchner Spatzen barnakórinum.

Mikudag 25. kl. 18.00



Pocahontas DR1
Óttaleysi hermaðurin, John Smith, er farin til Virginia at verja enskú niðursetismenninar, sum grava eftir gulli. Nærhendir hesum droymir indianaraprinsessan Pocahontas um, hvat framtíðin fer at bjóða henni og fólki hennara.

Mikudag 25. kl. 20.00

Rannvá og Rúna SVF
Í 1990 fingu Herfríð og Eli Falkvard í Sørvági tríburðar. Stutt eftir varð staðfest, at allar tríggjar genturnar vóru mongolar. Tá tær vóru ein mánað gamlar, doyði tann eina gentan. Í dag eru tær báðar Rannvá og Rúna 12 ára gamlar, og ganga í fjórða flokki í Sørvágs Skúla.

Mikudag 25. kl. 20.40

Eitt jólaævintýr SVF
Filmurin byggir á klassisku skaldsøguna hjá Charles Dickens um tað gamla grenjið Ebenezer Scrooge, sum ikki orkar fyri jólunum. Ebenezer er ikki serliga lívsglaður, og hann hevur lítla og onga samkenslu við sínum medmenniskjum. Men ein dagin broytist alt.

Mikudag 25. kl. 21.05

Elvis: That's the way it is TV2
Dokumentarsending um kongin sjálvan. Við nærum 30 væl kendum sangum, samrøðum við hópin av fjepparum og ikki at gloyma myndir frá stóra »Las Vegas International Show« hjá Elvis Presley.

Hósdag 26. kl. 17.30



Undan væðingini SVF
Havnamyndir 2. Í hesum partinum eru vit komin til 1924 og lunnar verða lagdir undir at Havnin verður tann mentanarmiðstøð, ssum vit kenna í dag.

Hósdag 26. kl. 18.00

101 dalmantinarar DR1
Stutt eftir at Roger og Anita eru flutt saman fáa dalmantinarar teirra, Pongo og Perla, hvølpar. Alt er gott, men órógv kemur í, tá Cruella de Vil leggur ætlanir um, hvussu hon kann fáa ein stóran dalmantinarapels at ganga í.

Hósdag 26. kl. 20.00

Profetanna spæl CANAL+
Swan, sum er detektivur, fær eitt postkort frá hópdrápsmanninum Little Jack, sum hann annars helt vera deyðan. Var tað rætti maðurin, sum doyði, ella er nú ein annars, sum kopierar drápsmynstrið hjá hinum?

Hósdag 26. kl. 22.55

Ein øðrvísi nátt SVF
Robert Woodward hevur leingi roynt at fingið ein taksabil í illveðrinum, tá Catherine bjóðar honum uppí hjá sær. Hon angrar skjótt, tí Robert er alt annað enn fólkaligur. Hann finnist at koyringini, at bilinum og at mongum øðrum, áðrenn bilurin fer á glið og rennur útav. Meðan kavarokið versnar, noyðast tey at hjálpa hvørjum øðrum at finna náttarskjól.

Leygardag 21. kl. 17.00

Sjomanssendingin Vitin
Kvinnuligi jolagesturin er fødd og uppvaksin í London.

Hon dugir vel at siga fra, og rætt-ur hátíðardámur er yvir prátinum.

Vit hoyra m.a. um ótespuliga sjó-ferð hennara til Føroya, tá ið hon kom higar fyrstu ferð. Sagt verður frá jólahaldi í Bretlandi, og hvussu útisetar í Keypmannahavn hugna sær um jóltíðir.

Serstaka uppliving hennara at fáa eitt jólabarn setir ikki minst dám á sendingina, sum M.C Restorff leggur til rættis

Sunnudagur 22. kl. 14.15

Framvið ánni ÚF
Jón Joensen í Bø greiðir frá um lívið hjá bíggjarmonnum nú og í farnum tíðum. Hugt verður inn í kirkjuna, sum stendur á áarbakkanum, har ungi deknurin Tróndur Niclasen greiðir frá.

Týsdagur 24. kl. 15.00

Jólatræ í útvarpinum ÚF
Tað er fastur siður at hava beinleiðis sending frá jólatræ í útvarpinum seinnapartin jólaaftan. Ongin broyting verður í so máta hesaferð. Klokkan 15.00 hittast smá og stór í leikhøllini í útvarpinum til at dansa jólatræ, syngja jólasangir, fáa eina jólasøgu og fáa vitjan av jólamanninum.

Mikudagur 25. kl. 14.15

Úr Sumba til Sidney ÚF
Gunnar Skúvadal hevur júst verið og ferðast í Australia, og har nýtti hann eitt nú høvið til at fara at práta við sumbingin, sum hevur búð í Sidney síðani seinast í sekstiárunum.

Hósdagur 26. kl. 14.15

Veðrasýning á Velbastað ÚF
Í nøkur ár hava garðarnir í Suðurstreymi havt tann sið, at teir í november mánað eru komnir saman at sýna veðrarnar. Endamálið er at betra um seyðin og at læra av hvørjum øðrum. Menn eru ómetaliga spentir til sýningina, og tað er einki yvir at dylja, at summir eru spentari enn aðrir. Men kortini eru øll samd um, at teir, sum gera mest við tað, draga hinar við sær.

MORGUNLESTRAR
í ÚF 23. - 27. desember
Axel Jacobsen lesur

Mánadagin 23. desember
nr. 123 Dýrasti Jesus
nr. 125 Eg standi tíni krubbu hjá

Týsdagin 24. desember
nr. 103 Tað sótu seyðamenn á vakt

Fríggjadagin 27. desember
nr. 118 Heilaga stund
nr. 116 Himmalsins harpur tóna

Leygardagur 28. desember
nr. 130 Hin vænasta rósan er funnin

ÍTRÓTTUR

Leygardagin kl. 14.00
Tipslørdag

CANAL+
Leygardagin kl. 14.55
Premier League: Chelsea-aston Villa

Sunnudagin kl. 13,55
Premier League: Blackburn-Manchester United

Sunnudagin kl. 15.55
Premier League: Liverpool-Everton

Tollaksmessudag kl. 18.55
Premier League: Man.City-Tottenham

2. jóladag kl. 13.55
Premier League: West Bromwich-Arsenal

2. jóladag kl. 02.00
NHLÆ: Edmonton-Vancouver

CANAL+
Leygardagin kl. 19.25
Seria A: Torino-Roma

Sunnudagin kl. 19.25
Seria A: Parma-Inter

Tollaksmessudag kl. 14.00
NHL: Carolina-Dallas

CANAL+ Zap
Leygardagin kl. 14.55
Premier League: Arsenal Middlesbrough

DR1
Sunnudagin kl. 11.10
Borðtennis: Danske Bank Cup

EUROSPORT
Beinleiðis hesa vikuna
Alpint WC úr Val Gardena, Italia

Skíðskjóting WC úr Osrblie, Slovakia

Bobsleðu WC úr La Plagne, Frakland

Ríðibanalop úr Grand Hall Olympia í London

Alpint WC úr Lenzerheide, Schweiz.

Skíðlop WC úr Engelberg, Schweiz.

VARPIÐ
Eykablað í Sosialinum hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Layout: Team 85
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin